# Vit eru ikki bangin fyri fólkaatkvøðu

**FÓLKAATKVØÐA** Í løtuni eiga vit brúka alla orku til at fáa búskapin aftur á beint, men tá ið vit eru komin á slætt, kunnu vit taka fólkaatkvøðu um loysingina, sigur Løgmaður

Áki Bertholdsen

- Sum støðan er nú, er tíðin ikki búgvin til at halda fólkaatkvøðu um ríkisfelagsskapin.

Tað heldur Kaj Leo Johannesen, løgmaður.

Hann fegnast kortini um, at Javnaðarflokkurin nú er farin at umrøða spurningin um at halda fólkaatkvøðugreiðslu um støðu okkara í ríkisfelagsskapinum.

- Fyri nøkrum árum síðani reisti eg sama spurning. Tá skeyt eg upp at hava fólkaatkvøðu um bæði ríkisfelagsskapin og ES. Men tá vildi Javnaðarflokkurin ikki, tí vit høvdu so nógv annað um oyruni, og at vit skuldu brúka alla okkara orku at hugsa um tað.

Men Løgmaður heldur, at sum støðan er nú, eiga vit at brúka allar kreftir upp á at fáa samfelagsbúskapin aftur á beint.

- Eg haldi ikki, at vit hava orku til at hugsa um eina fólkaatkvøðugreiðslu um ríkisfelagsskapin nú.



**GREIÐ STØÐA**

*Tað er ein trupulleiki, at so fáir flokkar hava eina greiða støðu til spurningin um loysing ella samband, sigur Kaj Leo Johannesen, løgmaður*

**Ongin veit**

Men Kaj Leo Johannesen heldur eisini, at ein stórur trupulleiki er, at hinir flokkarnir gera sær greitt, hvør teirra støða til ríkisfelagsskapin er.

» **Tað skal ikki bara vera ein fólkaatkvøða um loysing ella samband, tí tann spurningurin varð avgreiddur í 1946**
HØGNI HOYDAL

Tað heldur hann, at veljarin hevur krav upp á vita áðrenn eina fólkaatkvøðu.

Hann staðfestir, at tað eru bara Sambandsflokkurin og Tjóðveldi, sum hava eina greiða støðu, men hann heldur, at hinir flokkarnir eisini eiga at koma við eini greiðari fráboðan til veljararnar, hvør teirra støða er til spurningin til loysing ella samband.

- Sambandsflokkurin hevur havt fólkaatkvøðu um okkara ríkisfelagsskap á politisku skránni leingi og vit eru avgjørt ikki bangin fyri at skipa fyri tí.

Men Kaj Leo Johannesen heldur, at ein slík fólkaatkvøðugreiðsla eigur ikki at vera fyrrenn vit eru komin aftur á slætt eftir hetta búskaparliga ódnarveðri.

- So tá ið hetta er lagt aftur um um eini tvey, trý ella fýra ár, eru vit við upp á eina fólkaatkvøðu um ríkisfelagsskapin.

» **Í løtuni hava vit ikki orku til at skipa fyri eini fólkaatkvøðu**
KAJ LEO

## IKKI HEILT SO GALIÐ

Í Sosialinum mánadagin høvdu vit eina grein um, hvussu nógv føroyska samfelagið missur í skatti av tí, at so nógvir sjómenn eru undir serskipanum av ymsum slagi.

Greinin varð grundað á eina framløgu á landsfundi Javnaðarfloksins um vikuskiftið, har ført varð fram, at tað var stórur tørvur á eini nýskipan á skattaøkinum.

Í hesum sambandi varð ført fram, at føroyska samfelagið missur 168 milliónir um árið í skatti frá sjómonnum, sum eru undir DIS og 117,5 milliónir fyri teir, ið eru undir FAS, tilsamans 285,5 milliónir.

Hetta er eitt sindur misvísandi, tó at tað ikki broytir heildarmyndina.

Hetta er nevniliga upphæddin, ið ikki verður skattað, so mista inntøkan hjá samfelagnum er skatturin av tilsamans 285,5 milliónum.

Men harumframt er missur landið beinleiðis 80,4 milliónir í skatti frá fiskimonnum, sum eru undir eini skipan vi skattafrádrátti og 25 milliónir í skatti frá fólki, sum sigla við farmaskipum og eisini hava eina serskipan.

Niðurstøðan er framvegis, at samfelagið missur hundraðtals milliónir í skatti av tí, at so nógv fólk hava serskipanir av ymsum slagi.

## Ongin avgerð

Hóast spuringurin um eina fólkaatkvøðu um ríkisfelagsskapin varð umrøddur á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum um vikuskiftið, var ongin avgerð tikin.

Fleiri fundarluttakarar halda, at enn var spurningurin alt ov lítið viðgjørdur til at flokkurin kundi hava eina avgjørda støðu til hann.

Men nógvastaðni í Javnaðarflokkinum var góður hugur til at arbeiða víðari við málinum innanfloks og at koma við eini endaligari niðurstøðu.

## Spjaðir flokkin

Jóannes Eidesgaard ásannar, at eisini í Javnaðarflokkinum eru sera ymiskar meiningar um ríkisfelagsskapin.

- Hetta er ein spurningur, sum spjaðir meiri enn hann savnar í Javnaðarflokkinum tí hugsjónirnar ganga frá tí rættiliga loysingarsinnaða til tað heilt sambandssinnaða.

Og hann heldur, at tað er ein avbjóðing er at savna ein flokk, har áskoðanirnar eru so ymiskar.

Hann staðfestir, at hjá Javnaðarflokkinum hevur spurningurin um samband ella loysing ikki verið í fremstu røð, tí flokkurin hevur raðfest onnur mál hægri.

Hinvegin heldur hann eisini, at ein politiskur flokkur eigur at hava eitt greitt svar upp á ein so týðandi spurning, sum støða okkara í ríkisfelagsskapinum er.

Tí heldur hann avgjørt, at ein fólkaatkvøða um ríkisfelagsskapin hevði verið eitt hugskot, sum tað er vert at arbeiða víðari við.

» **Ein flokkur eigur at hava eitt greitt svar**
JÓANNES EIDESGAARD